# 25 pisur í Suðuroy

**Í miðnámsskúlanum í Suðuroy hava 25 studentar tikið prógv í ár. Næsta ár er umsøkjaratalið næstan tvífaldað**

NÝKLAKTAR PISUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Eins aðrastaðni í Føroyum, er hetta eisini tíðin, tá ið skúlarnir í Suðuroy eru lidnir. Eisini á Miðnámsskúlanum í Suðuroy hava tey nú riggað av.

Og í ár vóru tað 25 studentar, sum tóku prógv á miðnámsskúlanum í Suðuroy. Teir vóru í tveimum flokkum. Í øðrum flokkinum vóru 13 studentar og í hinum vóru 12.

Teir 25 nýklaktu studentarnir fingu prógvini á samkomu í Vágs skúla seinnapartin hósdagin og í gjárkvøldið klokkan 19 skuldi pisufundur vera á stóra fríøkinum við minnisvarðan yvir sjólætnar í Vági.

Har skuldi Jóannes Eidesgaard, løgmaður, halda pisurøðuna. Fyri studentarnir skuldu Rakul Borg úr Vági, røða.



*Í 3.x eru pisurnar:Aftara rað frá vinstru: Súsanna Dimon, Porkeri, Dan Veihe, Porkeri, Jan Vestergaard, Akrar, Ingun Midjord, Trongisvágur og Sára Vinther, Vágur.*
*Í fremra raði standa frá vinstru Elisabeth Kambsgarð Sørensen, Tvøroyri, Barbara Brattalíð, Trongisvágur, Lykke Beinta Kjær Poulsen, Tvøroyri, Eyð Tausen Magnussen, Fámjin, Rakul Borg, Vágur, Herit Vivi Albinus, Øravík og Tóra Maria Hammer, Fámjin*

### Fáa serligan heiður

Men gongst sum ætlað, verða tað munandi fleiri studentar, sum byrja aftur á skúlanum eftir summarfrítíðina.

Tað vísir seg nevniliga, at áhugin fyri at fara á studentaskúla, er munandi vaksin og umsóknirnar til at byrja á studentaskúla í Suðuroy eftur summarfrítíðina í ár er næstan tvífaldað afturímóti tí, tað er nú.

Sostatt byrja 44 næmingar á studentaskúlanum í Suðuroy eftir summarfrítíðina, soleiðis sum tað nú sær út. Tveir flokkar verða og annar flokkurin er fullur við 24 næmingum. Í hinum flokkinum eru næmingarnir 20 í tali.

Men hjá teimum, sum byrja á studentaskúla í Suðuroy eftir summarfrítíðina, eru eisini útlit til nakað heilt serligt. Og tað er at flyta í spildurnýggjan studentaskúla.

Skúlin húsast undir sera vánaligum umstøðum í fleiri hølum í Vági. Men nú er farið undir at byggja nýggjan skúla í sera náttúruvøkrum staði vesturi við Vatnið í Vági.

Gongst sum ætlað, verður skulin liðugur á sumri í 2006.

Sostatt verða tað tey, sum nú byrja á skúlanum, sum fáa heiðurin av at vera teir fyrstu næmingarnir í nýggja skúlanum.

Tey kunnu nevniliga síggja fram til at ganga tað seinasta árið í spildurnýggja og stásiliga skúlabygninginum tað seinasta árið.

### Byggingin seinkað

Nýggi Studentaskúlin í Vági hevur verið eitt umstríddur. Serliga er tað spurningurin um meginbókasavnið, sum stríð hevur verið um.

Ætlanin var at gera eitt meginbókasavn í sambandi við skúlan, men tað datt niðurfyri, tí kommunurnar í oynni tóku ikki undir við tí. Hvør kommuna skuldi betala sín part av bókasavninum, men Vágs Kommuna hevði átikið sær at betala tann størsta partin.

Men umframt Vág, vóru tað bara fámjiningar, sum vórðu sinnaðir at betala til bókasavnið.

Onkrar aðrar kommunu søgdu seg tó sinnaðar at vera við í ætlanini, um so var, at allar vóru við. Men tað eydnaðist ikki og sostatt datt ætlanin niðurfyri.

Hetta er rættiliga fallið Vágs Býráð fyri bróstið og á einum býráðsfundi herfyri, har spurningurin varð umrøddur, høvdu býráðslimir á munni, at tað varð ringt at tosa um samstarv í Suðuroynni, tá ið kommunurnar ikki so frægt sum kundi semjast um hetta.

Teir vístu eisini á, at grivið var út fyri bókasavninum, men nú stóð bara eitt grótbrot eftir. Men hetta grótbrotið skuldi eita meginbókasavnið, søgdu teir.

Tað varð eisini ført í gerðarbókina hjá kommununi, at tað bara vóru fámjiningar, sum høvdu játtað at vera við í ætlanini.

Eisini leiðarin á Miðmámsskúlanum, Ole Laursen, harmast um, at meginbókasavnið datt niðurfyri.

Hann sigur, at skúlin vildi fegin havt eitt meginbókasavn. Men tá ið ætlanin kom upp, vóru tey meiri ivingarsom, Men tað var ikki tí, at tey vóru ímóti sjálvum bókasavninum. – Eitt meginbókasavn vildu vit fegin havt. Men tá ið hugskotið kom um at gera eitt slíkt í sambandi við nýggja skúlan, var als onki fyrireikað í sambandi við bókasavnið. Og vit stúrdu fyri, at skuldi eitt meginbókasavn fyrireikast og tengjast upp í skúlan, fór tað at seinka byggingini, sigur hann

Hann sigur, at tað hevur eisini seinkað byggingini, hóast tað nú datt niðurfyri kortini.

Men eftir nýggu tíðarætlanini, skal skúlin so verða liðugur í august í 2006.



*Í 3.a eru pisurnar: Aftara rað frá vinstru: Eiler Sørensen, Porkeri, Elvis Hammerfoss, Leo, Froðba, Jóan Pauli Klein Thomassen, Vágur, Hjalgrím Thór Andreasen, Vágur og Sonni Thorbjørn Petersen, Froðba.*
*Í Fremra raði frá vinstru eru tær Alexandra Guðrið Múller, Porkeri, Sára Maria Holm, Porkeri, Annika Norðberg, Vágur, Guðrun Dimon, Trongisvágur, Yngva Ramona Vestergaard, Vágur,Eir Jógvansdóttir, Trongisvágur, Sigrid í Skemmuni, Porkeri og Charlotta Djurhuus, Porkeri*



# Ein stór provokatión

**Formaðurin í mentanarnevndini í løgtinginum, Andrias Petersen, heldur lítið um framferðarháttin hjá leiðsluni í SVF. - Teir taka okkum til gíslar við hasum framferðarháttinum, sigur hann**

SAMSENDA VIÐ DR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



– Eg má siga, at eg undrist stórliga á framferðarháttin hjá teimum. Hatta er ómetaliga fantasileyst, um teir vænta at fáa fleiri pengar við hasum framferðarháttinum. Við núverandi búskaparstøðu kunnu vit als ikki lova teimum eina hægri játtan.

Formaðurin í mentanarnevndini í løgtinginum, Andrias Petersen, heldur lítið um framferðarháttin hjá Sjónvarpi Føroya. Hann er sannførdur um, at talan er um eina provokatión frá leiðsluni á stovninum fyri at fáa eina hægri játtan.

– Teir taka okkum til gíslar við hasum framferðarháttinum. At markið er sett til 1. oktober er sjálvsagt ikki tilvildarligt, tí júst tá verður farið undir at viðgera fíggjarlógina fyri 2005, vísir eysturoyartingmaðurin hjá Javnaðarflokkinum á.

### Aðrar rásir

Andrias Petersen sigur, at fremsta uppgávan hjá SVF er at upplýsandi og viðkomandi føroyskt tilfarð.

– Vit skulu sjálvsagt hava tilfar úr Danmark, men eg haldi tað er ógvuliga primitivt bert at velja eina rás. Normenn og sviar eru eisini stinnir til at gera sjónvarp, og hví ber ikki til at fáa tilfar frá teimum, spyr formaðurin í mentanarnevndini.

*– Teir taka okkum til gíslar við hasum framferðarháttinum. At markið er sett til 1. oktober er sjálvsagt ikki tilvildarligt, tí júst tá verður farið undir at viðgera fíggjarlógina fyri 2005, vísir Andrias Petersen á*

Spurdur, um hann væntar, at ætlanirnar hjá leiðsluni í SVF gerast veruleiki, svarar Andrias Petersen, at tað er ilt at meta um.

– Leiðslan í SVF hevur fullan avgerðarrætt í at leggja skránna, og tí kann politiski myndugleikin ikki ávirka raðfestingarnar hjá stovninum, sigur Andrias Petersen at enda.

# Gevst heldur klokkan 21

**Fyrrverandi landsstýriskvinnan í mentamálum, Annita á Fríðriksmørk, heldur, at Sjónvarp Føroya átti at sløkt eftir klokkan 21, um orka ikki er til at umseta útlendska tilfarið til føroyskt. - Tað er burturvið, at vit skulu rinda 2000 krónur í sjónvarpsgjaldið fyri at hyggja at óviðgjørdum útlendskum tilfarið, sigur tjóðveldistingkvinnan**

SAMSENDA VIÐ DR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í Degi og viku hóskvøldið kom undan kavi, at leiðslan í Sjónvarpi Føroya hevur ítøkiligar ætlanir um at kollvelta sendiskránna hjá stovninum. Stjórin í SVF, Mikkjal Helmsdal, segði í Degi og viku, at frá 1. oktober í ár verður føroyskt tilfar at síggja millum klokkan 18-21 hvørt kvøld, meðan restina av senditíðini verður samsent við donsku sjónvarpsrásina DR.

–Fíggjarligi karmurin hjá SVF er smalur, og tí hava vit heldur tikið hetta stigið, enn at siga 3-5 fólkum úr starvi. Vit hava fingið eina góða avtalu við DR, har lítil og eingin samsýning verður givin, og Sjónvarpið fer tí at spara pening, greiddi Mikkjal Helmsdal frá í Degi og viku hóskvøldið.

### Heldur svartan skerm

Farna samgonguskeið sat tjóðveldistingkvinnan, Annita á Fríðriksmørk, eitt skiftið sum landsstýriskvinna í mentamálum. Vit hava spurt hana, hvat hon heldur um kollveltandi stigið hjá leiðsluni í Sjónvarpi Føroya.

– Samsendingin við DR má fyri alt ikki gerast ein koddi hjá SVF. Málsetningurin má sjálvsagt vera at framleiða meira føroyskt tilfar eftir klokkan 21. heldur Annita á Fríðriksmørk.

Hon er av teirri áskoðan, at kann SVF ikki fáa útlendsku sendingar umsettar til føroyskt, er skilabetri, at Sjónvarpið gevst at senda eftir klokkan 21.

– Tað er burturvið, at vit skulu rinda 2000 krónur í sjónvarpsgjaldið fyri at hyggja at óviðgjørdum útlendskum tilfarið. Er ikki orka til at umseta tilfarið ella fáa føroyskar røddir, átti Sjónvarpið at havt svartan skerm eftir klokkan 21. Sum fremsti mentanarberin í føroyska samfelagnum skulu vit sjálvsagt hava útlendska tilfarið umsett til føroyskt, sigur tjóðveldistingkvinnan



### Ikki afturstig

Spurd, um talan er um eitt afturstig hjá Sjónvarpi Føroya, svarar tingkvinnan, at tað metir hon ikki. Hon vísir á, at SVF hevur sum er nógvar DR-sendingar á skránni, og einasti munurin verður, at sendingar hjá DR verða sendar feskar, heldur enn forskotnar.

# Illa við

**Landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, gjørdist rættiliga illa við av tíðindunum í Degi og viku um, at SVF ætlar at samsenda við DR stóran part av senditíðini**

SAMSENDA VIÐ DR
*Páll Holm Johannesen*

Landsstýrismaðurin, Jógvan á Lakjuni hvakk við, tá hann í Degi og viku hoyrdi sjónvarpsstjóran, Mikkjal Helmsdal greiða frá avgerðini hjá leiðsluni um at samsenda við DR í vetur.

Við Útvarp Føroya sigur landsstýrismaðurin, at hann hevur ikki verið í samband við leiðsluna í Sjónvarpinum um ætlanina, og hann vónar, at hann fær høvið til at skifta orð við sjónvarpsstjórin um avgerðina.

Jógvan á Lakjuni er fullgreiðir yvir, at hann ikki hevur heimildir at blanda seg í redaktionellu viðurskiftini hjá SVF, men hann ynskir kortini at tosa nærri við sjónvarpsstjóran.

Í Útvarpi Føroya setti landsstýrismaðurin spurning við, um SVF ikki flytir redaktionellur ábyrgdina úr Føroyum til at Danmarkar at umsita.

Spurdur um útlitini fyri eini hægri játtan til SVF, svaraði Jógvan á Lakjuni, at tað fór at verða trupult at játta fleiri pengar til SVF.

# Ikki nøktandi



*– Út frá einum public service sjónarmiði er tað sjálvandi ikki nøktandi. Eg ivist í, um tað er rætt at blanda eina danska public service rás og eina føroyska upp á handa mátan, sigur Tróndur Djurhuus, fyrrverandi sjónvarpsstjóri*

Sjónvarp Føroya hevur gjørt av at samsenda við sjónvarpsrásina hjá Danmarks Radio. Samsendingin skal verða frá klokkan tólv á middegi hvønn dag. Nýggja skráin byrjar í heyst.

Tað føroyska tilfarið, sum verður at síggja, skal verða millum klokkan seks og níggju á kvøldi. Hetta er av sjónvarpsstjóranum Mikkjali Helmsdal definera sum eitt sparitiltak. Fleiri fólk skulu ikki sigast úr starvi, sigur hann.

Men fyrrverandi sjónvarpsstjórin, Tróndur Djurhuus, heldur ikki, at nýggja skráin hjá SVF er nøktandi.

– Út frá einum public service sjónarmiði er tað sjálvandi ikki nøktandi. Eg ivist í, um tað er rætt at blanda eina danska public service rás og eina føroyska upp á handa mátan. Tað gjørdi eg vart við í teimum sjónvarpssendingum, sum vóru herfyri, sigur Tróndur Djurhuus.

– Eg kann siga tað, sum eg segði í jubileums-sendingini hjá sjónvarpinum herfyri, har eg meinti, at tað er skilagott, at Sjónvarp Føroya sum stovnur framleiðir føroyskt tilfar til fleiri miðlar - bæði til sjónvarp, internet, og hvat mann annars kann hugsa sær. Og so meinti eg tað, at tann framleiðslan, sum sjonvarpið kemur við, liggur í primetime í einari skrá, sum annars er føroysk. Men aðrar viðmerkingar havi eg so ikki, sigur Tróndur Djurhuus, fyrrverandi sjónvarpsstjóri.

**-hkm**